


www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 08 - 2012

# Løgmaður á orkufund fyri at lurta og marknaðarføra Føroyar

Tað er av stórum týdningi, at vit kunnu vera við á slíkum oljumessum, um man vil menna handil millum lond og fyritøkur, savna inn vitan og byggja út sambond. ONS er ein týðandi partur av marknaðarføringini av Føroyum sum komandi oljuland og at fáa samband við eitt nú teir aktørar, sum vera við til komandi boringar her. Vit hava longu sum er eitt bein innan fyri oljuvinnuna, har føroyingar eru til arbeiðis á oljuskipum, pallum og hjá feløgunum,sum eru frammaliga í hesi vinnu, sigur Kaj Leo Johannessen, løgmaður, sum er til toppfund í sambandi við oljumessuna ONS í Stavager. Oljan.fo spurdi løgmann, áðrenn hann fór á fund í Stavanger, hvat hann roknar við at fáa burtur úr - Eg fari at brúka tíðina at lurta sum mest møguligt og kunna læra av tí. So kann eg eisini greiða frá oljulóggávu og hvør okkara strategi og marknaðarføring er. Her kemur tú í sambandi við bæði politikarar, embætisfólk og framstandandi oljufólk, so tað kann vónandi eisini brúkast til at seta fokus á Føroyar sum leitiøki. -Eitt av stóru samrøðuevnunum á toppfundinum er arktiska økið. Vitandi at landsstýrið hevur sett út í kortið eina strategi fyri Føroyar í Arktis, hvussu sær tú tá okkara støðu í Arktis, hvørjar møguleikar hava vit har, nú so mong onnur stór lond royna at gera sína ávirkan galdandi? Taka vit skipaferðsluna millum lond og heimspartar so síggi eg okkara plaseing í Atlantshavi sum ein einastandandi møguleika fyri at fáa part av framtíðar vaksandi virkseminum. Her finst ein strategi fyri Ríkið, sum vit eru partur av, og har mugu vit sjálvandi til at seta orð á teir møguleikar, sum stinga seg upp nú ísurin bráðnar í Grønlandi og Arktis sum heild. Vit koma uttan iva at uppliva, at tað fara at sigla stór skip inni á okkara sjóøki og síggja vit hetta eisini longuí dag. Fyri tveimum árum síðani, skrivaðu vit saman við nógvum øðrum londum undir eina SAR avtalu, Search & Rescue og her er spurningurin eisini, hvørji nýggja arbeiðspláss hetta fer at geva í

økinum.  Hetta eru eisini mál, sum løgmaður fer at taka upp á Ríkisfundinum í Grønlandi í vikuni aftaná toppfundin í Stavanger. Hann rósar grønlendingum fyri at hava tikið so væl ímóti føroyskum sjófólki, sum eisini hava verið við til at menna Grønland. Tað eru nógvir føroyingar, sum hava verið við til at forvinna til lívsins uppihald í Grønlandi, kanska fleiri enn øvugt. Vit vilja tí fegnir sleppa at halda fram við arbeiðsmøguleikum í Grønlandi eins og teir her hjá okkum. Herfyri hevði løgmaður vitjan av kinesiska sendiharranum í Danmark. Teir umrøddu m.a. leitingina eftir kolvetnum í Føroyum og gjørdi kinesiski gesturin løgmanni greitt, at Kina var noytt til at gera íløgur kring heimin fyri at fáa atgongd til rávørur, sum kunnu, byggja undir búskapin í landinum. Hann helt tað vera rættiliga einastandandi, at eitt so lítið land sum Føroyar kundi sita á so stórum mongum av fiski og helst olju eisini.